## Ikki fólkaatkvøða enn

Á fundi í gjár samdust samgonguflokkarnir um, at uppskotið til Stjórnarskipan Føroya skal leggjast fyri Løgtingið í hesari tingsetuni. Stjórnarskipanin fær tó ikki gildi, fyrr enn fólkið hevur sagt sína hugsan um hana á einari fólkaatkvøðu, og hon kann ikki haldast fyrr enn í fyrsta lagi eitt hálvt ár eftir, at Løgtingið hevur samtykt tað. Tað er tí lítið hugsandi, at fólkaatkvøðan um stjórnarskipanina verður hesumegin komandi løgtingsval.

## Nýggjar oljutangar

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur givið partafelagnum frá 14. februar í 2006 umhvørvisgóðkenning til at seta tríggjar oljutangar á Enninum í Fuglafirði. Talan verður um tveir tangar til brenniolju og ein til gassolju, og teir verða tilsamans 19.000 rúmmetrar stórir. Felagið ætlar at selja Havsbrún og skipum olju, og tí skal ein oljuleiðing leggjast til Havsbrún. Felagið fer nú at søkja Fuglafjarðar kommunu um byggiloyvi.

Jørgen Niclasen, fyrrverandi fiskimálaráðharri:

# Krevja at samgonguskjalið verður hildið

**- Eg útiloki ikki, at fiskivinnuskipanin kann broytast, men tað skal gerast í samsvari við samgongujskjalið, sum týðiliga sigur, at slíkar broytingar skulu gerast í samráð við vinnuna, sigur Jørgen Niclasen, fyrrverandi fiskimálaráðharrin.**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jørgen Niclasen, fyrrverandi fiskimálaráðharri og framsøgumaður Fólkafloksins í fiskivinnumálum, er ógvuliga ónøgdur við útmeldingarnar hjá Bjørn Kalsø. – Hetta má steðga. Nú skal samgonguskjalið haldast!*

Í kjalarvørrinum av málinum um Atlantic Navigator sigur fyrrverandi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, at tað á ongan hátt undrar, at vinnan reagerar.

- Fiskimálaráðharrin kemur ferð eftir ferð við útmeldingum, sum bara øðrkymla vinnuna. Og er tað nakað, ið vinnan hevur brúk fyri, eru tað tryggir karmar, sigur Jørgen Niclasen.

Hann fílist serliga á, at Bjørn Kallsø eftir øllum at døma liggur í sjálvdrátti í flestu málum, og at fiskimálaráðharrin als ikki tryggjar sær politiskan meiriluta fyri teimum uppskotum, sum hann »sleingir út«.

- Tað er í heilum, at fiskimálaráðharrin leggur uppskot fram uttan at tryggja sær stuðul í politiska baklandinum. Og hetta skal steðgast. Vit fara at krevja, at samgonguskjalið verður hildið, og tað sigur týðiliga, at broytingar í fiskiskipanini skulu bert fara fram í samráð við vinnuna – og hetta hevur Bjørn Kallsø heilt ignorerað, sigur Jørgen Niclasen, sum eisini er framsøgumaður Fólkafloksins í fiskivinnumálum.

Hann heldur, at skinkluta støðan hjá fiskimálaráðharranum, har hann sleingir um seg í eyst og vest við útmeldingum av ymsum slag, rykkir teppið undan vinnuni. Og at reiðaríið hjá Atlantic Navigator nú hevur tikið støðu um at steðga við fiskiskapinum undir føroyskum flaggi, bara er ein avleiðing av ótryggu støðuni, sum vinnan er komin í orsakað framferðini hjá Bjørn Kallsø.

Tað stutta av tí langa er so, at Fólkaflokkurin sambært Jørgeni Niclasen ikki longur fer at finna seg í, at fiskimálaráðharrin letur hánt um samgonguskjalið, men tekur vinnuna við upp á ráð, um talan verður um broytingar, ið ávirka fiskivinnuskipanina.

# Starvsfólk flýggja frá Toll- & Skatt

**Seinasta árið eru minst 18 starvsfólk rýmd frá Toll- & Skatt í Havn. Ótrygg arbeiðsviðurskifti og betri tilboð frá øðrum arbeiðsplássum til hægri útbúnu starvsfólkini, eru tvær av orsøkunum**

STARVSFÓLKAFLÝGGJAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Toll- & Skattstovan hevur seinasta árið upplivað eitt satt mannfall av starvsfólkum. Av økisskrivstovuni fyri Streymoyarøkið eru 11 av 62 fólkum farin seinasta árið, og enn verri stendur til við gjøgnumtrekkinum í Albert Hall, har 7 av 30 starvsfólkum hava sagt starvið frá sær seinasta hálva árið.

Vælvitandi keldur, sum Sosialurin hevur tosað við, siga, at fleiri orsøkir eru til stóra exodus'ið úr stovninum. Ein av orsøkunum eru drúgvu bygnaðarbroytingarnar, sum ikki tykjast fáa ein enda. Onnur orsøkin er vánaligi trivnaðurin, ið stendst av hesum umskipanum og í triðja lagi rýma best útbúnu starvsfólkini til onnur arbeiðspláss, ið kunnu bjóða betri sømdir og betri løn.

So trupulleikin má sigast vera, ikki bert at fólk rýma av stovninum, men tað er hartil best útbúnað fólkið, ið søkir aðrar avbjóðingar.

Broytingar og umskipingar á stovninum hava ført samanleggingar við sær. Og hetta hevur so aftur ført til, at starvsfólkatalið náttúrliga minkar. Men tann veruleikin er ikki einasta orsøkin til starvsfólkaflýggjanina. Hesar broytingar hava nú staðið við í meiri enn trý ár, og enn er eftir øllum at døma ikki komið á mál. Tíðirnar eru góðar, og við ótryggleikanum í huga er einki at siga til, at fólk, ið til dømis fáa bjóðað annað - og betri – starv, gleðiliga taka av.

### Góðar tíðir

Deildin í Runavík, deildin í Norðoyggjum og í Vágum eru lagdar saman í eina deild, sum skal flyta í hølir í Gøtu. Har skulu hølir byggjast at húsa samanløgdu deildini, og eftir ætlan skal nýggja deildin flyta til Gøtu í seinasta lagi í mars mánaði komandi ár. Har eru eingi starvsfólk farin úr starvi sum skilst.

Arnold Hjelm Nielsen er stjóri á Toll- & Skatt, og hann váttar, at gjøgnumtrekkurin av starvsfólkum hevur verið størri enn vanligt. Men hann vísir á, at almenn arbeiðspláss vanliga hava ávísar trupulleikar at halda upp á fólkið í góðum tíðum.

Tað er einki óvanligt, at fólk í góðum tíðum fáa tilboð frá privatum arbeiðsplássum um betri løn og arbeiðsviðurskifti, og tí síggja vit hetta fyribrigdi í hesum døgum, sigur Arnold Nielsen.

Men hann viðgongur eisini, at broytingarnar á stovninum kunnu hava sína ávirkan á stóra talið av starvsfólkum, ið søkja aðrar leiðir.

Nýggj leiðsla er komin á stovnin, har hann sjálvur sum stjóri er partur. Og Arnold leggur dent á, at ein av uppgávunum hjá nýggju leiðsluni er at umskipa stovnin og savna somu uppgávur á sama stað, so uppbyggjast kann ein servitan á økjunum. Longu í 2003 varð byrjað at tosa um broytingar, og í løtuni verða so ætlaðu broytingarnar settar í verk. Men hetta tekur tíð og kreftir.

Sjálvt um nóvg fólk er farið seinastu tíðina, so royna vit at seta nýtt fólk í staðin sum skjótast. Og vit meta sjálvi, at vit hava spennandi og avbjóðandi uppgávur til starvsfólkið, sigur Arnold Hjelm Nielsen, stjóri á Toll- & Skatt.




*Starvsfólk eru seinasta árið rýmd í stórum tali frá Toll- & Skatt. Góðu tíðirnar fáa ein part av skuldini*